FYLGISKJAL 5

# Landsfelag Pensjónista

Argir 21. okt. 2019

**Almannamálaráðið**
**Eirargarður 2**
**100 Tórshavn**

Verður sent við telduposti til amr@amr.fo

**HOYRINGSSVAR**

Almannamálaráðið hevur við telduposti tann 8. okt. 2019 sent Landsfelag Pensjónista hetta lógaruppskot til hoyringar:

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almannapensjónir o.a.**
(Lættari atgongd hjá fyritíðarpensjónistum at flyta millum Føroyar, Danmark og Grønland)

Landsfelag Pensjónista hevur fylgjandi viðmerkingar til lógaruppskotið:

Landsfelag Pensjónista tekur undir við lógaruppskotinum, at marknaðarforðingarnar verða burturbeindar í ríkisfelagsskapinum, soleiðis at ein fyritíðarpensjónistur ikki er verri fyri, tá hann flytur innan ríkisfelagsskapin, enn tá hann flytur til onnur norðurlond.

Landsfelagið heldur ikki, at lógaruppskotið vísir nóg greitt hvussu fyritíðarpensjónistar, ið flyta úr Føroyum við lægstu ella miðal fyritíðarpensjón verða fyri, tá teir flyta til Danmarkar ella Grønlands.

Vegna

Landsfelag Pensjónista

Beate L. Samuelsen, forkvinna